## Cimber Sterling flúgvandi



Tað hevur gingið sera væl hjá danska flogfelagnum Cimber, síðani tað keypti leivdirnar av felagnum Sterling fyri góðum trimum mánaðum síðani. Jørgen Nielsen, stjóri í Cimber Sterlingi, sigur við Ritzau, at tey hava sett 100 fólk í starv síðani samanleggingina, og at væntandi verða 100 onnur sett afturat í hesum árinum. Eitt mál við samanleggingini var at skipa 20 nýggjar rutur, og tí er tað serliga flogskiparar og flogternur, sum hava fingið arbeiði hjá Cimber Sterling í vetur.

## Prestar fáa hjálp til at trúgva

Nú kunnu prestar í trimum biskupadømum í Danmark fáa hjálp til at varðveita trúnna á tann Guð, sum teir sjálvir prædika um hvønn sunnudag. Tað skrivar Kristeligt Dagblad, sum eisini veit at siga, at alt fleiri prestar koma í hesar "trúarbólkarnar", har prestarnir fáa hjálp til sjálvhjálp í viðurskiftunum við Guð. Presturin Preben Kok, sum er ein av stigtakarunum til hesar trúarbólkarnar, sigur við Kristeligt Dagblad, at í veruleikanum hava prestarnir sjálvir brúk fyri at fáa eitt sindur av tí heilivági, sum teir sjálvir prædika.

# Neyðútgerð sum bjargar mannalívum á havinum

**Fyritøkan MP-Teknik í Klaksvík er nú farin at marknaðarføra ein sendara av merkinum SEA-Marshall, sum fyritøkan hevur gjørt avtalu um at selja í Føroyum**

TRYGD

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Útgerðin, sum felagið í Klaksvík hevur gjørt avtalu um, er soleiðis háttað, at um ein maður dettur á sjógv, fer ein sendari beinanvegin at senda á eini altjóða neyðbylgju.

Undir marknaðarføringini av útgerðini í Føroyum eru tað serliga nøkur av føroysku alifeløgunum, sum higartil hava víst neyðútgerðini ans.

Hjá MP-Teknik siga tey, at sendarin er so lítil, at fólk saktans kunnu hava hann hangandi um hálsin í einum hálsbandi – ella í beltinum, sum er í einum bjargingarvesti.

Slóðbrótandi við hesum lítla sendara er, at hann kann halda á at senda í heilt upp í 36 tímar.

### Nógvir møguleikar

Sendarin kann eitt nú setast í samband við eina støð, sum kann standa á bátinum ella á aliflakanum.

MP-Teknik sigur, at tá fólk so fara at leita eftir manninum, kunnu tey við einum hondpeilara finna mannin, og sendarin kann eisini peilast av skipum hjá Vaktar-og Bjargingartænastuni, eins og tyrlum og flogførum.

- Lítli sendarin peilast heilt upp til 5 fjórðingar og í minsta lagi 2-3 fjórðingar. Hetta merkir, at maður, sum fer á sjógv, kann finnast og bjargast eftir stuttari tíð.

### Langtrøkkandi skipan

MP-Teknik sigur, at tá SEA Marshall útgerðin verður brúkt av útróðrarmonnum, er sendarin háttaður soleiðis, at hann gevur boð inn á eina aðra langtrøkkandi skipan, sum er sett saman við einum gps'ara, sum sigur knattstøðuna, har báturin er staddur, tá alarmurin fór í gongd.

Útgerðin kann eisini brúkast av kavarum, og tá er hon vatntøtt í minsta lagi niður á 100 metrar, men er testað niður á 300 metrar.

- Kavarin útloysir eitt serligt flot sum ger, at sendarin fer upp til vatnskorpuna og sendir neyðboð.

MP-Teknik sigur, at við hesi útgerð eru ikki minst útrórðarmenn, sum mangan eru einsamallir á báti, nógv tryggari, tí neyðútgerðin hevur nógvar ymiskar møguleikar sum kunnu vera hentir, tá vanlukkan rakar.

- Ein av møgleikunum er, at útgerðin kann sløkkja motorin, um maður dettur fyri borð, sigur MP-Teknik í Klaksvík.




*- Slóðbrótandi við skipanini er, at sendarin kann halda á at senda í heilt upp í 36 tímar, sigur MP-Teknik, sum nú marknaðarførir útgerðina*




*Sendarin er so lítil, at fólk saktans kunnu hava hann hangandi um hálsin í einum hálsbandi – ella í beltinum, sum er í einum bjargingarvesti*

SKEIÐ 25. MARS 2009

**Betri stýring og rykkjan av skuldarum / debitorum**

*- FÁIÐ ÚTISTANDANDI PENING Í HÚS*

**SENDA TIT HÓPIN AV RYKKJARUM?**
Ofta er tað trupult at vera tann, sum við fremstafingri á lofti skal ringja til kundan fyri at minna hann á at gjalda. Hetta kann verða ein tyngjandi ábyrgd, sum í ringasta føri kann føra við sær, at tit aldrin fáa peningin inn?

Á skeiðnum fært tú íblástur til, hvussu tú á bestan hátt handfarir skuldarar líka frá fyrsta faktura verður send, til fyribyrgjan av tapi, til áminngarskriv, ómaksgjøld, rentur og innheintan. Tú fært eisini íblástur til, hvussu tú tryggjar eitt gott og javnbjóðis samskifti við kunda og varðveitir góða sambandi, soleiðis at kundin framvegis ynskir at verða kundi í fyritøkuni.

**SUPER GÓÐAR EFTIRMETINGAR**
Luttakarar hava givið hesum skeiðið og skeiðsleiðarunum, heili 10,3 í miðal eftir 13'skalanum.



**MÁLBÓLKUR**
Størri og smærri fyritøkur, ið ynskja at fáa størri succes við at fáa útistandandi pening í hús.

**TILMELDING OG MEIRI UM SKEIÐIÐ**
Les meiri um skeiðið á heimasíðu okkara www.synergi.fo. Her kanst tú eisini tekna teg. Tú ert eisini vælkomin at ringja, um tú ert í iva um eitt-hvørt - 32BELL (322355).

Synergi

Synergi • Tvørgøta 13 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
synergisynergi.fo • Tel. +298 22RING (227464)